# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SO FEKK EIK AFTUR FÓTAFESTI

So varð Eik Banka handilin umsíðir avgreiddur. TF Holding eigur nú 70 prosent av bankanum, og higani skulu fólkini handan tryggingarrisan á Kongabrúnni í Havn og fólkini í Eik Banka fáa bestu góðynski.

Men tað hevur verið ein ikki sørt margháttlig tilgongd. Í elvta tíma hjá gamla Eik Banka varð ein roynd gjørd at fáa TF Holding at taka um stýrisvølin í kolsiglda bankanum. Tað miseydnaðist. Síðani varð bankin lagdur undir Finansiel Stabilitet, felagið, sum júst er stovnað til hetta endamálið.

So tyktist friður aftur valda, til nevnd og leiðsla í Finansiel Stabilitet beyð fjølmiðlunum á ein ikki sørt margh) áttligan tíðindafund, har nevndarformaðurin í Finansiel Stabiliteti við peikifingrinum á lofti hótti við at niðurleggja og avvikla bankan, um ein loysn ikki varð funnin fyri jól.

Hetta var vánalig roynd at leggja trýst á føroysku myndugleikarnar, og tað var ikki frítt, at nógvir tankar kring landið leitaðu aftur til nítiárini og sváru bankakreppuna, sum tá var.

Men endin varð kortini tann – sum vit eisini stungu út í kortið á hesum stað fyri júst tveimum mánaðum síðani, at TF Holding keypir bankan – og eigur bankan í fystu syftu saman við Finansiel Stabilitet. Altso, hóttanin hjá nevndarformanninum í Finansiel Stabliltet var tað reina bluff!

Tað sum nú verður spennandi at síggja er, hvussu TF Holding ætlar at skipa bankan. Vit hava fleiri ferðir víst á, at júst TF Holding hevur ein bygnað, sum minnir alt ov nógv um bygnaðin í gamla Eik, har tað er leiðslan sum ræður og har eigararnir eru ein flyktigur massi, sum er ringur at definera. Vit eiga bara í felagnum, tí vit av tilvilid hava teknað trygging hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Umboðsráð og leiðsla verða vald á ein løgnan hátt, sum als ikki er hóskandi í eini modernaðari fyritøku. Tilvildarlig fólk uttan krøv um førleikar verða vald at stýra milliarda fyritøku, og tað boðar ikki frá fíggjarligum støðufesti, sum átti at eyðkent eina slíka fyritøku.




Tí má tað ikki henda, at TF Holding flytir sama bygnað yvir í Eik og heldur ikki setir nevndarlimum krøv um kvalifikatiónir. Tað er tó ein glotti, at nevndarformaðurin í TF Holding í gjár segði, at tað verður umhugsað at broyta bygnaðin kring TF Holding og Tryggingarfelagið Føroyar, so okkurt er, sum bendir á, at felagið er farið undir eina sjálvrannsakan, sum vónandi endar við, at felagið verður demokratiserað og moderniserað – gott hevði tó verið, um felagið kunnaði »partaeigararnar« (tryggingartakararnar) um slík viðurskifti, tí teir hava einki forum at venda sær til.

Vit fegnast tó um, at Eik Banki aftur hevur fingið fótafesti og ynskja nýggju eigarum hartaliga tillukku!

## Gott at TF Holding fer undir sjálvrannsakan

# Okkara nýggjan stjóra

### Steinbjørn í Dali hevur tikið við sum stjóri á bryggjaríinum Okkara

**Randi Jacobsen**

Í vikuni var stjóraskifti á bryggjarínum Okkara. Wilhelm Petersen, sum hevur verið stjóri, síðan bryggjaríið byrjaði fyri einum ári síðan, er farin frá, og Steinbjørn í Dali er nýggjur stjóri.

Óli Hansen, nevndarformaður sigur, at tað alla tíðina var ætlanin, at Wilhelm Petersen bara skuldi vera stjóri eina tíð fyri at fáa fyritøkuna í gongd.

Steinbjørn í Dali hevur frammanundan starvast í fyritøkuni og tikið sær av tí fíggjarliga.

Wilhelm Petersen sleppur ikki tilknýtinum til Okkara heilt, tí hann er nevndarlimur.



# Parkeringsóskil á Skálatrøð

**Randi Jacobsen**

Nú færri parkeringsbásar eru á Skálatrøð í Havn, hendir tað meira enn so, at fólk bara seta bilin onkrastaðni, og hetta forðar øðrum bilum at sleppa út

Út við 50 parkeringsbásar eru nú færri á Skálatrøð í Havn, eftir at kommunan er farin undir at gera skoytubreytina undir berginum har.

Politiið ivast ikki í, at hetta er orsøkin til parkeringsóskilið, sum nú er á økinum.




Hósdagin fekk politiið tvær klagur frá bileigarum, sum høvdu sett bilar sínar á básar, men teir sluppu ikki út aftur, tí aðrar bilar stóðu fyri – uttan fyri básarnar.

Politiið sigur, at í slíkum føri ringir politiið til bileigararnar og biðjur teir flyta bilar sínar.

Standa bilar uttan fyri básarnar, fáa eigararnir bót.



## Fimm aðalráð er tað rætta

KÁRI Á RÓGVI
KJAK Á SÍÐU 21



## Sólar sær í læntum fjaðrum

BJØRN KALSØ
KJAK Á SÍÐU 18

# Prestavígslur í Dómkirkjuni sunnudagin



Sunnudagin verða tveir nýggir prestar vígdir í Dómkirkjuni í Havn.

Tað eru nýggju prestarnir í Hvalvík og Fuglafirði, Bergtórur Bjarkhamar og Anne Mette Greve Klemmentsen, sum byrja í nýggjum størvum, ið verða vígdir.

Bergtórur Bjarkhamar er føroyingur, meðan Anne Mette Klemmentsen er dani, gift føroyinginum, Leif Hansen úr Nólsoy.

Anne Mette Klemmentsen er júst liðug við útbúgvingina sum prestur, og hon flutti heim til Føroya við familjuni í vikuni. Hon er kortini ikki ókend við Føroyar, tí umframt at vera gift føroyingi hevur hon gingið á háskúlanum í Havn.

Í hesari vikuni eru Anne Mette og Leif flutt inn í prestagarðin í Fuglafirði, og annan sunnudag heldur nýggi fuglfjarðarpresturin sína fyrstu prædiku í prestagjaldinum.

Anne Mette Greve Klemmentsen og maðurin Leif Hansen eiga tvey børn, Beintu og Helga.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*